

# Havfrakt stendur enn

**Farmaskipið Havfrakt, sum tíðliga sunnumorgunin rendi á eitt sker í Norðurnoregi, stendur framvegis. Reiðarin vónar, at tað fer at bera til á flóððini seinnapartin í morgin at toga skipið leyst aftur**

Randi Jacobsen

Eitt hendiligt óhapp.

Soleiðis umrøður Álvur Højgaard, reiðari a fraktskipinum Havfrakt, sum tíðliga sunnumorgunin sendi á eitt sker í Norðurnoregi.

Skipið hevur í fleiri ár siglt har á leiðini, men tað var myrkt, og teir sigldu innanskers.

Havfrakt hevði verið í Íslandi eftir fiskamjøli, og tveir triðingar av lastini vóru komnir í land. Umborð eru um 500 tons av fiskamjøli, sigur Álvur Højgaard.

Eingin vandi er fyri umhvørvisskaða av skipinum, og teir fimm menninir, um framvegis eru umborð, hava tað gott. Tað er tí eingin ólukka, um skipið stendur í nakrar dagar.

Nú royna reiðaríið og myndugleikarnir at finna ein máta at fáa fiskamjølið úr skipinum aftur, áðrenn skipið verður togað leyst. Har er grunt, so farið verður helst við flakum eftir mjølinum.

Álvur Højgaard sigur, at havnamyndugleikarnir eru bangnir fyri, at hol skal koma á skipið, tá ið tað verður hálað leyst. Álvur Høgaard heldur ikki, at vandin fyri tí er so stórur, tí tað er ein hella, skipið stendur á.

NH Frakt & Sand í Runavík eigur Havfrakt, sum varð smíðað í 1979.

# Injetor Trawldoors farið á húsagang

**Tryggingarfelagið Føroyar hevur mist nakrar milliónir krónur, nú fyritøkan Injektor Trawldoors hjá Jan Allani Müller og øðrum er farin av knóranum. Eftir situr ein long røð av kreditorum**

Randi Jacobsen

Alt ljóðaði væl, tá ið Jan Allan Müller og onnur stovnaðu fyritøkuna Injektor Trawldoors í Horsens í Danmark.

Tryggingarfelagið Føroyar hevði álit á fyritøkuni.

– Endamálið hjá okkum er eisini at stuðla upp undir føroskar fyritøkur, og vit mettu at trollemmarnir vóru ein tann besta uppfinningin, sum nakrantíð er gjørd. Tí settu vit pening í felagið, sigur Gunnar í Liða, stjóri í Tryggingarfelagnum. Men ilt er at tryggja seg móti óreglusemi, sigur hann.

Tryggingarfelagið keypti seg gjøgnum eitt annað felag inn í fyritøkuna og hevur síðan havt umboð í nevndini.

Gunnar í Liða veit ikki nágreiniliga, hvussu nógvan pening Tryggingarfelagð hevur mist, men talan er um fleiri milliónir krónur.

Hann heldur hetta vera eitt sera óheppið mál. Nevndin hevur illgruna um, at fyritøkan fór av knóranum vegna óreglusemi.

– Vit og leiðslan í Danmark meldaðu málið til politiið, tí vit høvdu sterkan illgruna um óreglusemi. Vit vilja hava alt kannað, og er óreglusemi farið fram, má tað fáa avleiðingar. Hvør steinur skal vendast, sigur Gunnar í Liða.

Politiið í Horsens váttar fyri Sosialinum, at málið er meldað, men vil annars ikki upplýsa nærri um málið .

Sosialurin hevur roynt at fingið eina viðmerking frá Jan Allani Müller, men tað hevur ikki eydnast.

# Hava roynt nýggjar bussar til Bussleiðina

**Samráðingarnar um nýggjan bussáttmála halda fram, og í tí sambandi hava umboð fyri samráðingarpartarnar verið uttanlands at kanna og royndarkoyra bussarnar**




Randi Jacobsen

Verandi bussar hjá Bussleiðini í Havn eru fleiri slitnir og gamlir, og nakrir skulu skiftast út.

Í sambandi við, at samráðst verður um nýggjan busssáttmála, skulu nýggir bussar keypast.

Umboð fyri teir, sum koyra, fyri umsitingina hjá kommununu og forkvinnan í teknisku nevnd hava júst verið í Danmark og kannað og royndarkoyrt nýggjar bussar av slagnum Sor.

Hesin bussurin verður framleiddur í Tjekkia og er øll undirgrindin frá Volvo. Bussarnir av SOR-merkinum hava typugóðkenning í bæði ES og hjá danska Ferðslustýrinum og hava hægstu umhvørvisgóðkenning. Umboðini eru væl nøgd við bussarnar og eru samd um, at frammanundankunningin samsvarar við royndirnar, tey nú hava gjørt við hesum bussum.

Tað var 2. september, at býráðið samtykti at fara undir samráðingar við Gundurs Bussar, eftir at arbeiðið hevði verið boðið út, fyrst í undangóðkenning, har tríggir tilboðsveitarar vórðu góðkendir. Út frá eini heildarmeting mælti tekniska umsiting at fara undir samráðingar við Gundurs bussar og hesum tók tekniska nevnd undir við, síðani fíggjarnevnd og býráðið.

Tann nýggi sáttmálin fer at fevna um allar leiðirnar, umframt býarleiðirnar 1,2 og 3, so verða bygdirnar Kaldbak, Kollafjørður, Velbastað og Kirkjubøur eisini knýttar uppí bussleiðina. Sambært fyribils tíðaræltlan, sum gjørd er, verður miðað eftir, at teir nýggju bussarnir eru at síggja á gøtunum í vár.